# ítróttur

Nr. 73 • hósdagur • 18. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Holte tapti finaluna



Holte við Bárði Mikkelsen á liðnum tapti um vikuskiftið DM-finaluna í flogbólti. Bárður hevur tó góðar vónir til komandi kappingarár. Her er hann í dysti fyri føroyska landsliðið á oyggjaleikunum

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

**Bárður Mikkelsen og liðfelagarnir úr Holte taptu sunnudagin DM-finaluna móti HIK Ålborg. HIK vann finaluna sannførandi 3-0**

FLOGBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Tað eydnaðist ikki havnarmanninum Bárði Mikkelsen at gerast danmarksmeistari á hesum sinni. Lið hansara, sum eitur Holte, tapti dyggiliga fyri HIK úr Ålborg, og endaliga úrslitið av finaluna gjørdist 3-0. Settúrslitini vóru 25-22, 25-22 og 25-22.

Eingin ivi var um, hvør betra liðið var, og HIK var eisini stórfavorittur undan finaluni. HIK hevur verið einaráðandi í donskum flogbólti í ár og vann somuleiðis steypafinaluna fyrr í ár, tá Holte eisini var mótstøðuliðið í finaluni.

– Vit taptu móti einum betri liði, hóast settini vóru ógvuliga jøvn. Vit vóru bara ikki nóg neyvir, tá vit skulu vinna teir avgerandi bóltarnar. HIK vísti sera gott álopsspæl, og vit fingu ongantíð tamarhald á dystinum, sigur Bárður.

### Væl nøgdur

Bárður sigur tó, at teir í Holte eru væl nøgdir hetta kappingarárið. Holte hevur eitt nýtt lið, ið er ein blanding av ungum og eldri leikarum.

– Um vit halda fram við sama liði, so eru vónirnar til komandi kappingarár góðar, og alt bendir á, at vit fara at hava somu manning eftir summarsteðgin, sigur Bárður.

Karmarnir um finaluna sunnudagin vóru annars góðir. 1450 áskoðarar vóru til dystin, sum varð spældur í Århus Arena. Stóra ítróttarrásin Viasat Sport vísti eisini dystin beinleiðis í sjónvarpinum.

# Pylsumenn boykotta

**Svangir áskoðarar, ið vóru til dystin millum Danmark og Ísrael mikukvøldið, høvdu ikki møguleika at keypa reyðar pylsur, tí sølumenninir boykottaðu dystin**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Sølumenn, ið selja reyðar pylsur kring Parkina í Keypmannahavn, vóru ikki til staðar at geva svangum gómum okkurt gott undir tonna eftir og undan dystinum millum Danmark og Ísrael í Parkini í gjárkvøldið.

Nakrir pylsumenn boðaðu undan dystinum frá, at teir ikki fara at selja pylsur tann mikudagin. Talan er um pylsubúðir, ið eru nær við leikvøllin.

Orsøkin til at pylsumenninir steingja búðirnar eitt kvøld, tá teir annars kundu selt fleiri pylsur enn vant er, at teir boykotta hernaðarligu átøkini hjá Ísrael í Palestina. Hetta mugu svangir áskoðarar svíða fyri.

Ístaðinfyri at arbeiða fara pylsumenninir at luttaka í mótmælisgonguni í Keypmannahavn ímóti Ísrael.

# Fótbóltsblaðið í handlarnar

**Fótbóltsblaðið hjá Sosialinum er nú at fáa í handlunum. Blaðið viðgerð øll liðini í føroysku 1. deild, og hvørjar møguleikar tey hava undan hesum kappingarárinum. Tað er prentað í litum og kostar 30 krónur**

ÚTGÁVA
*Stefan í Skorini*




*Fótbóltsblaðið hjá Sosialinum fæst nú til keyps. Blaðið hevur 60 síður og kostar 30 krónur*

Fótbóltsblaðið hjá Sosialinum, sum nevnist Fótbóltur 2002, kann nú fáast til keyps í handlunum kring landið.

Tað er á støðd við vanliga blaðið, men góðskan á pappírinum er betri, og allar síðurnar eru prentaðar í litum. Blaðið telur 60 blaðsíður, og inniheldur alt um liðini í 1. deild. Nógv er tískil at lesa hjá fótbóltsáhugaðum undan hesum kappingarárinum. Fleiri blaðmenn hava verið saman um at skriva blaðið.

Í blaðnum fæst alt at vita um leikarahópar hjá liðunum, samrøður eru gjørdar við leikarar, venjarar og onnur innan fótbóltin í Føroyum. Eisini eru bakgrundsgreinar og hagtøl. Tú kanst tískil lesa alt um títt lið og fáa eina hilling av, hvussu støðan er.

Umframt at viðgera heimligu kappingina verður hugt fram ímóti árinum hjá landsliðnum í 2002, har føroyska liðið skal spæla ímóti Týsklandi, sum er ein risi í altjóða høpi. Harumframt eru samrøður við ungar leikarar, ið hava royndarvant við feløgum uttanlands.

Tey, sum keypa blaðið, hava møguleika at luttaka í eini kapping, har vinningurin er ein ferð til dystin millum Týskland og Føroyar.

Blaðið er komið á gøturnar og kostar bara 30 krónur.



# Favorittarnir víðari

**Um vikuskiftið vóru fleiri dystir í innleiðandi umfarinum í steypakappingini hjá kvinnum. Einki óvæntað úrslit var at síggja, tí favorittarnir fóru allir víðari**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*Eyðfríð Christiansen og tær úr HB skulu í fjórðingsfinaluni møta NSÍ á heimavølli, og HB man vera favorittur til at spæla seg víðari til hálvfinaluna*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

Á Argjum vann AB ein tryggan 5-0 sigur á kvinnuliðnum úr Vágunum, sum nú er endurstovnað. Maria Michelsen skeyt trý tey fyrstu málini, meðan Elin Kathrina Haraldsen og Eyðbjørg Andreasen fingu hini bæði málini.

Í Runavík vann NSÍ 2-0 á Sumba. Støðan var eisini 2-0 í hálvleikinum. Sólvá Steinhólm og Anna Olsen skutu málini hjá heimaliðnum.

Kvinnuliðið hjá B68 er somuleiðis víðari til fjórðingsfinalurnar. Toftakvinnur vunnu grannauppgerðina móti GÍ við tveimum málum móti ongum, eftir at tað hevði staðið á jøvnum við steðgin. Linda Joensen legði B68 framaum, og Mary Ann Isaksen staðfesti sigurin við seinna málinum.

Fjórði dysturin í innleiðandi umfarinum var millum B71 og Skála. Sandoyingar vunnu 5-2 og fara sostatt víðari til fjórðingsfinalurnar, har tær møta VB á útivølli. Elin Højsted legði B71 framum 2-0, og Frígerð í Soylu økti til 3-0, sum var støðan í hálvleikinum.

Eftir steðgin økti Gerda Magnussen, og Elin Højsted fekk sítt hat-trick, so støðan var 5-0. Síðani slapp Skála framat, og Sólfríð Christiansen og Poula Olsen minkaðu um munin til 5-2.

**Úrslit:**
AB – FS Vágar 5-0
NSÍ – Sumba 2-0
B68 – GÍ 2-0
B71 – Skála 5-2

Avgjørt er, hvussu spælt verður í fjórðingsfinalunum, sum verða spældar sunnudagin 21 apríl:

KÍ – B68
HB – NSÍ
B36 – AB
VB – B71

# Regin heldur fram sum formaður



*Regin Egholm heldur fram sum formaður í felagnum 12. manni. Øll nevndin varð annars afturvald*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

12. MAÐUR
*Stefan í Skorini*

Áskoðarafelagið hjá føroyska landsliðnum hevði í seinastu viku aðalfund. Regin Egholm, sum var við til at stovna felagið, heldur fram sum formaður, og nevndin varð øll afturvald.

Niels Olaf Arge Sølvará er næstformaður, og Suni Jacobsen er kassameistari. Janus Rein er skrivari og Regin Bláhamar er nevndarlimur.

Endamálið hjá felagnum er at stuðla føroyska landsliðnum til dystirnar á heima- og útivølli, og í hesum sambandi er onkur sera spennandi dystur fyri framman. Talan er serliga um dystin móti Týsklandi í oktober mánað. Tá verður óivað skipað fyri ferð til dystin. Ein útidystur er eisini móti Litavia í heyst. Einasti heimadysturin verður ímóti Skotlandi á Svangaskarði.

# Hvar er bólturin?




tað er ikki loyvt at kopiera henda lepa

**Gitið, hvar bólturin er, og vinnið eina ferð til stórdystin millum FCK og Brøndby**

12. mai í ár verður stórdystur í Danmark. FCK tekur tá ímóti Brøndby, og longu nú er líkt til, at hetta verður dysturin, sum ger av, hvar DM-gullið skal fara í ár.

Sum kunnugt skipa Atlantic Airways og Sosialurin fyri ferð til Keypmannahavnar í samband við dystin, og nú ber til hjá onkrum hepnum lesara at vinna sær pláss á hesi ferð.

Tað ræður snøgt sagt um at gita, hvar bólturin eigur at vera á myndini. Skrivað á lepan, í hvørjum teigi tú heldur bólturin eigur at vera, og send síðani lepan til okkara. Allir lepar við rætta svarinum verða latnir í ein pott, og hin 27. apríl fara vit at kunngera, hvør hepni vinnarin er. Um so er, at hesin longu hevur keypt sær ferðaseðil til dystin, ber sjálvandi til at fáa hendan endurgoldnan. Kappingin verður í blaðnum til og við 23. apríl. Minnist til. Jú fleiri lepar tit senda inn, størri er møguleikin fyri at gerast hepni

**Navn:** ______________________
**Bústaður:** ______________________
**Tlf:** ______________________
**Eg giti, at bólturin er í teigi:** ______________________

**Seðilin skal sendast til:**
**Sosialurin, postsmoga 76, 110 Tórshavn.**
**Merkið brævbjálvan "FCK"**

Sosialurin
ATLANTIC AIRWAYS